

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 08 - 2012

# Olju-gassfund setir stór krøv til Føroyar

- Og vit mugu tí fyrireika okkum væl segði Johan Dahl, landsstýrismaður á tingi týsdagin, tá ólavsøkurøða løgmans varð til umrøðu. Hann kom inn á boringina hjá Statoil og segði, at hetta er størsta íløga í Føroyum nakrantíð, har man brúkar 1,1 milliard krónur til oljuleiting. Borast skulu 5200 metrar og er boringin fyri oljufeløgini sera áhugaverd, tí hon fer niður um basaltfláirnar og fer at geva eina stóra vitan um tað, sum liggur undir basaltinum og hvussu løgini har eru skipað. Vit vænta sjálvandi, at tað fer at vera við til - um vit ikki finna olju ella gass hesuferð - at man í framtíðini veit, at olja og gass eru í føroysku undirgrundini. Landsstýrismaðurin helt fyri, at hetta setir sjálvandi stór krøv til okkara samfelag, og tað er tí sera umráðandi fyri okkum, at vit fyrireika okkum til tað, sum kemur - hvussu vit kunnu skipa okkum, tá oljuleitingin hevur borið frukt, og vit vita, at tað eru burðardyggar mongdir í teimum feltum, sum verða borað. Henda boringin tekur fýra mánaðir frá nú av, og vit eru sjálvandi sera spent at frætta, hvat úrslitini verða til ta tíð.